HOYVÍKAR SKÚLI

Ársfrágreiðing 2015

Skúlastýrið hevur frá byrjan á 2015 arbeitt við at fáa fysisku karmarnar uppdateraðar. Kommunan hevur í fleiri ár verið vitandi um vánaligu karmarnar skúlin hevur. So vit løgdu út við einum fundi við Tórshavnar kommunu í januar. Torført hevur verið at fingið kommununa til at raðfesta Hoyvíkar skúla, og av tí at nakrar umvælingar hava verið sera átroðkandi, valdu vit at seta ynski fram um uppdateringar, sum kunnu fremjast her og nú. T.d. innbúgv til næmingar og lærarar, útskifting av gólvum á bókasavninum og starvsfólkarúminum og at fáa innihald til skúlagarðin til næmingarnar at spæla við.

Umvælingar eru í gongd í 4 stovum. Ætlanir eru um aðrar umvælingar seinni í ár. Kommunan hevur biðið skúlan heinta inn tilboð uppá innbúgv. Skúlin arbeiðir við tí.
Skúlastýrið hevur eisini virkað fyri, at lærarnir hava fingið fyrstuhjálparaskeið, og skúlin hevur fingið ein hjartastartara.

Skúlastýrið arbeiðir við at fáa greiðari reglur at vísa foreldrum á, hvussu ein skal fyrihalda seg tá t.d. børn mistrívast (happing) ella tá klaga verður um t.d. lærarar. Hetta stendur sum skrivaður tekstur inni á heimasíðu skúlans, men vit vilja virka fyri, at fáa mannagongdir meira sjónligar á heimasíðuna. Arbeitt verður í løtuni við nýggjari trivnaðarætlan. Skúlarnir hava fingið boð frá MMR um at hava eina dagførda trivnaðarætlan á heimasíðuni.

Í samband við trivnaðarætlanina hava vit tosað eitt sindur um telefonir og trivna. Niðurstøðan var, at vit skulu spyrja lærararnar um, hvat teir halda og so taka evnið uppaftur.

Nú er møguleiki at bíleggja matpakka frá Matarskipanini PM Pluss. Hendan skipan er væl móttikin.
Skúlastýrið hevur sett sær fyri at hava eitt yvirskipað mál at arbeiða við. Vit eru samd um, at skúlagarðurin er eitt gott mál. Í løtuni verður arbeitt við uppdatering av skúlagarðinum. Okkara ynski er at fáa nakað sum líkist tí, sum er í Grasagarði. Vit halda, at skúlin liggur sentralt í Hoyvík, og eitt tílíkt spælipláss kundi komi til sín rætt í hesum økinum eisini aftaná skúlatíð.